PERISKOP
FORUM FOR KUNSTHISTORISK DEBAT

Periskop: Forum for kunsthistorisk debat

Nr. 32, 2024

“Føroysk listasøga í dag”

Heiti: “Tita Vinther: At veva tað einlitta”

Høvundur/høvundar: David W. Norman

Blaðsíðutal: 85-93

Dagfesting: 31.10.2024

DOI: 10.7146/periskop.v2024i32.150463



DAVID W. NORMAN

# Tita Vinther

## At veva tað einlitta

Frá fyrst í 1990'unum til 2010'ini framleiddi føroyska og finnlendska vevlistakvinnan Tita Vinther (1941-2019) eina røð av tekstilverkum, sum fylgdu eini einfaldari og tó gátuførari uppskrift. Hvørja ferð hon var liðug at veva eitt einfalt, ferhyrnt skap við ljósari, einlittari ull, seymaði Vinther einkult litað ella natúrlig hestahár beint inn í grundtilfarið í listvevnaðin. Heitini mana ofta tær lítlu broytingarnar fram í umhvørvinum so sum *Sirm* (1993) **[1]**, sum er eitt av nógvum verkum í hesum formatinum í savninum hjá Listasavni Føroya. Ljósið í verkinum, tann natúrliga ullin og avbleikta hestahárið sipa til roðan í támfjaldum dagsljósi. Onnur verk, so sum tað heilt svarta *Tað er tvætt í hvørjari ætt* (2011) **[2]**, ið varð gjørt næstan tvey áratíggju seinni, framkallar kenslubornar ella relationellar støður – í hesum førinum er tað tann stigmatiserandi upplivingin av at verða *hingjørd/ur.*[1] Eitt, sum er sermerkt í hesi røðini, er, at endarnir á hestahárinum í *Tað er tvætt í hvørjari ætt* eru lagdir við kopari.

Sjálvt um Vinther framleiddi hesi einlittu, vovnu verkini yvir eitt longri tíðarskeið á yrkisleiðini, eru tey heldur lítillátin samanborin við hennara drúgvu praksis, sum radikalt víðkaði um "siðbundnu" mátarnar at veva formar, tilfar og innihald. Anne-Kari Skarðhamar (2011, 98-99) skrivar, at verkini hjá Vinther birtu undir kjak í Føroyum um markið millum "list" og "handverk." Tann avmarkingin, sum hesar flokkanirnar hava við sær, sæst aftur í tí, at Vinther valdi at veva eina spennitroyggju í samband við eina framsýning hjá feministiska listakollektivinum Dyr, sum hon stovnaði saman við Guðrið Poulsen og Astrid Andreassen. Hennara oeuvre inniber bæði rúmstórar installatiónir, sum eftirlíkna segl og net úr mannahári (*Pætursnótin*, 1998 og *Segl,* 2006) **[3]** og tøtt trídimensjonell verk, sum spæla við skulpturellar konvensjónir. *Koparmorgun, Koparsól, Koparglеði* (2009) úr vovnum rullum úr kopartræðri, fyltar í glasskáp, eru dømi um hetta. Men hóast hetta er tekn um eksperimenterandi format, so var hon dedikerað til at varðveita vevsøguna. Hetta vísti hon í 1991, tá hon endurskapaði eitt miðaldarsegl úr heimaspunnari ull til víkingaskipssavnið í Roskilde (Skarðhamar 2011, 93).

Minimalu kompositiónirnar úr ull og hestahári tykjast at veita minni til tulking samanborið við hesari stóru verkætlanir, men við at seta veving sum miðil lið um lið við eitt einslitt format, kunnu tey veita ein møguleika at endurskoða ta vanligu retorisku tropuna í danskari umrøðu av føroyskari samtíðarlist.[2] Í eini ritroynd, sum stóð í kataloginum til framsýningina *Kolonialen* á Norðuratlantsbryggjuni, tilskrivar Jens Frederiksen (2004, 75) seg til eitt lætt, men tó ofta nýtt uppáhald, tá hann staðfestir, at list er eitt "lutfalsliga nýtt fyribrigdi" á oyggjunum. Frederiksen sipaði í grundini til ta "lutfalsligu nýggju" støðuna hjá *málninginum* (og í minni mun hjá standmyndum), men tað er nokk so afturvendandi, at



**[1]** Tita Vinther: *Sirm*, 1993. Ull og hestahár, 127 x 96 cm. Listasavn Føroya.

siðbundnir listamiðlar verða settir javnt við list. Til dømis Dagmar Warming (2006, 14) skrivaði um royndirnar hjá Vinther við menniskjahári, "hon vevur ikki eitt lørift – eina mynd í tveimum dimensjónum – men ein skulptur í trimum dimensjónum." Hóast hendan lýsingin fangar nøkur lyklahugtøk í site-responsive-verkætlanunum hjá Vinther, so forðar hon okkum í at skilja veving sum sína egnu listagrein, tí hon leggur upp til at síggja tekstilu praksisina sum *annaðhvørt* eina standmynd *ella* ein málning – ein listagrein, sum í andsøgn við uppáhaldið hjá Frederiksen, hevur djúpar røtur í hesum samanhanginum.

Sæð í tí ljósi, at tey einlittu verkini hjá Vinther seta hol á spurningar um málninga- og skulpturlist – uttan at svara teimum – so leggja spurningarnir upp til at skoða út um ein listasøguligan karm, ið er miðsavnaður um tær ávísu traditiónirnar í nevndu listagreinunum. Í tráð við tær nýggjaru framsýningarnar, sum Listasavn Føroya hevur skipað fyri, so sum *Landslagið í broyting* (2022), ið legði dent á, at listafólk tvørtur um ættarlið samstundis hava luttikið í altjóða og staðbundnum listarákum, ætli eg mær at víðka referansukarmarnar fyri at eftirmeta leiklutin hjá Vinther í føroyskari listasøgu. Samanborið við tær landsumfevnandi ella regionalu yvirlitsframsýningarnar vóru flestu av hennara framsýningum, meðan hon var á lívi. Bakgrundin hjá Vinther var heldur tvørtjóðað: Fødd í Finnlandi, var sum barn nógv í Danmark, áðrenn hon flutti til Føroya í 1960. Hon fór í læru ella tók vevskeið í øllum hesum londunum í 1960'unum og 70'unum. Í samsvar við ferðingina, sum myndaði hennara lív, tekur hendan ritroyndin skap sum ein meditatiónsrøð um einlittu, vovnu verkini, sum setir tey í samrøðu við eklektisk rák. Eg ynski at vísa, at hesi smáu tekstilverkini leggja upp til at síggja føroyska listasøgu knýtta í altjóða samrøður um feministiskar listaskarar, tá postminimalisman endurskoðar minimalistiska serialitetin, heitið handverk og hvussu tað er knýtt at spurninginum um listaligt arbeiði, og haraftrat problematiska, rasuknýtta upprunan til ta einlittu tropuna.

### Handverk og list

Solveig Hanusardóttir Olsen (2023, 7) hevur eygleitt, at tá listafólk nýta seyðaull, so vekir tað beinanvegin tankar um "tilknýtið til heimlandið, náttúruna í Føroyum og leiklutin hjá menniskjanum í henni," hugasambond, sum endurspegla eina gamla, søguliga ullframleiðslu á oyggjunum.[3] Undir miðøldini og í byrjanini av modernitetinum var tað seyðahaldið, ið gav nógvum føroyingum grundarlagið til at vera sjálvbjargnir, og sum

Føroya virðismiklasta útflutningsvøra veitti seyðahaldið grundarlag fyri mentanarbýti í Norðuratlantshavi. Í øldunum áðrenn ríkið Danmark-Norra fylktist, var ull ofta fraktað til havnina í Bergen á handilsleiðini, sum føroyskir handilsmenn í stóran mun røktu (Øye 2008, 225). Við øðrum orðum, áðrenn listafólk fóru at umskriva idéirnar um vistfrøðiligu og mentanarligu oyggjaeyðkennini til landslagsmálning – eitt rák, sum kann knýtast at tjóðskaparligum rørslum í nítjandu og byrjanini av tjúgundu øld (Nauerby 1996) – hevði materialiteturin í ullini sligið djúpar røtur í øki og fólk og tær vistfrøðiligu og fíggjarligu umstøðurnar, sum knýta tey saman.

Ull sum tilgongiligt tilfar til list umboðar eina dramatiska broyting í mentanarligu tignini hjá ullini. Aftan á at spunamaskinurnar og vevtøknin tekur dik á seg í nítjandi øld, fellur føroyski tekstilídnaðurin, og í dag verður ull ofta burturbeind eins og burturkast. Karina Lykke Grand viðmerkir, at seyðurin so at siga ongantíð var umboðaður í føroyskari list í teirri tíðini, tá tekstilin enn var umráðandi í føroyska búskapinum. Hugasambondini, ið vóru knýtt at ullini, broyttust frá at vera okkurt "at lívbjarga sær" við til okkurt "eyka", tá ullin fór at verða sett alsamt meira í samband við marglætislutir og ta romantiseraðu áskoðanina hjá ferðafólkum á føroyska landslagið (Karina Lykke Grand er endurgivin í Eriksen, Armand og Alminde 2019). Tann prikandi spurningurin um, hvat "handverk" er, verður aktuellur í samband við ta longu vevsøguna hjá sjálvlærdum, føroyskum listafólkum, tann mista fíggjarliga týdningin hjá tí vovna, og tað økta virðið, sum hondgjørt arbeiði hevur í tí *post-fordiska*.[4]

Í ritgerðini um praksisina hjá Vinther deilir Skarðhamar (2011, 90) føroyska listasøgu í tvey rák: eitt, sum verður flokkað sum "Føroysk fólkslig list, hitt /.../ týsk ekspressiónisma" – við fyrsta eygnakast ein meinaleys meting. Tó so hava listasøgurnar í Norðuratlantshavi ofta marginaliserað "fólksliga list" ella handverk. Framsýningin *Kolonialen* var eitt gott dømi um hetta (tey føroysku verkini fevndu bara um málningar, skulpturar og prent). Sum T'ai Smith (2016, 80) greiðir frá, at hóast handverk "er grundarlagið undir so at siga



**[2]** Tita Vinther: *Tað er tvætt í hvørjari ætt,* 2011. Ull, hestahár, og kopar, 176 x 110 cm. Listasavn Føroya.

øllum listaverkum", hevur modernaða og samtíðarliga listasøgan leingi beint spurningar um tað hondgjørda burtur, har "handverk" sum serøki verður órímiliga nógv nýtt at lýsa vørur, sum eru gjørdar í kvinnuligum, rasuknýttum og verkamannaligum arbeiði, ið ofta verður útihýst úr diskursum og listastovnum. Um "handverk" sipar til eitt vaknari ansni til samspælið millum makara og tilgongdina at framleiða eitthvørt, enn "list" kann loyva,



er vandi fyri at essentialisera tilgongdir við handgjørdum arbeiði, soleiðis at listagreinar so sum veving verða lýstar sum heilt mentanarbundnar, ella enn verri at eksotifisera listagreinarnar sum løgnar, avoldaðar, ótíðarhóskandi - dygdir, sum Kim Simonsen (2022) viðmerkir, eru vanligar í donskum stereotýpum um Føroyar.

Tey einlittu verkini hjá Vinther dvølja óróliga millum tvíbýtið handverk og list. Tað, at tey eru vovin á einum loddrættum vevstaði – ein aldargomul tøkni við langari søgu í norðurlendskari teppiframleiðslu – vísir, hvussu fast Vinther hevur forpliktað seg til sjálvan miðilin. Men tað, at hon leggur hestahár aftrat, gevur tekstilinum ein farra av onkrum løgnum animalskum ella antropomorfiskum, sum heilt greitt skilir tey sundur frá vanligum nýtslulutum. Vevingin verður eitt landslag umvegis hestahár – djóratægrir gerast plantutægrir við

**[3]** Tita Vinther: *Segl*, 2006. Menniskjahár, lín og rustað jarn, 135 x 530 x 400 cm. Listasavn Føroya. Mynd: Ole Wich.

hondini á vevaranum - og hon leggur fram eitt slag av gykl, sum minnir um paradoksalar lutir so sum BLESS Beauty Hairbrush **[4]**. Flottir hárlokkar floyma úr botninum á bustini og kunngera háðandi hennara ónýtslu og umskapa tann designaða lutin til eina spegilsmynd av sínum ímyndaða menniskjafelaga. Akkurát sum bustin allegoriserar sína egnu nýtslustøðu, draga vovnu landsløgini hjá Vinther eygað til djóraupprunan hjá vevingini og tað tilfarsliga tilknýtið í umhvørvinum.

Tey einlittu, vovnu verkini destabilisera bæði "handverk" og "list", men tað, at tey arbeiða ímóti tí, at

vovin verk verða útihýst úr “fine arts” samanhangum, er helst ein størri ætlan við. Vinther var inniliga tilvitað um kynjaðu hugasambondini, ið vóru knýtt at tekstilari list, og hon sýndi regluliga fram í eyðsýndum feministiskum rúmum. Aftrat verkætlanunum við Dyr í 1997 var hon við í eini framsýning, sum Olivia Pertrides skipaði fyri í Artemisia Gallery í Chigago, uppkallað eftir Artemisia Gentileschi (Cassidy 1997). Við at skilja at hennara verk seta spurning við sterku sundurbýtingina av list og “fólksligari list” í føroyskari listasøgu, kunnu fleiri spurningar setast við kynjaðu sundurbýtingina. Eitt nú tekur Vinther hetta fram, tá hon sipar til ta málaða einlitta.

### At veva og at mála

Vovnu verkini við hestahári minna um konventiónirnar og formarnar hjá málningalistini, og ikki minst soleiðis sum tey engasjera seg við ta einlittu tropuna, og tí víkja tey frá metingini hjá Warming av teimum stóru installatiónunum eftir Vinther. Hóast alt so er tekstil gjølla vavt saman við søgu, ástøði og tí tilfarsliga eginleikanum í málningalistini; í fleiri førum er vevingin við sínum vovna lørifti bókstaviliga talt grundarlagið hjá málningalistini. Grindin í nógvum modernaðum málningum – sum afturvirkandi ekkóar ta fløtu, ætthyrntu yvirflatuna á løriftinum – finnur sín javnlíka aftur í vevingini, sum er bundin at vevstaðnum. Vevstaðurin rørslustjórnar rúmið í ein væl skipaðan stoypiform við renning og veftri. Einlittu tekstilverkini hjá Vinther kunnu við fyrsta eygnakast tykjast at vísa hendan strukturalistiska skyldskapin, ið javnsetur einlitta diskursin við vevpraksisina, havandi í huga teirra tilknýti til veggin. *Sirm* og *Tað er tvætt í hvørjari ætt* verða hildin uppi av metalstongum, sum eru fjaldar aftan fyri endarnar í erva og neðra. Tær halda spenninginum og syrgja fyri, at verkini loddrætt kalla fram í huga tað, sum Rosalind Krauss (2008, 133) argumenterar møguliga er kjarnan í málninginum, miðlaspesifikka spenningin: Tann fyrigyklandi aktin at lyfta eina vatnrætta flatu “upp á loddrætta økið hjá løriftinum og harvið á eina geometri, sum ‘mátar’ og ‘kontrollerar’ hana.”

Eisini tá ið verkið verður avmyndað, merkist tað taktila í *Sirm* – ið er tað, sum dygdar-Bauhaus-tekstillistamaðurin Otti Berger (1930) eyðmerkir sum tað miðlaspesifikka prinsippið, ið er kjarnan í *veving*. Líka sum kondensering lekur gjøgnum ein rút, lyfta bleiku hestahárini tekstilgrundina upp í eitt tjykkri rúm við trimum dimensjónum – upp í leysa luft eins og rennandi regn, sum heitið sipar til. Um tað er so, sum Krauss skjýtur upp, at statusurin hjá málninginum sum miðil kemur frá aktini at tvinga eina vatnrætta flatu til at passa til ta loddrættu orientatiónina hjá menniskjanum, at máta og varðveita rúmdina á løriftinum sum eitt innstikað grundstykki á einum matrikkli, so krevur tað eitt heilt annað sjónarmið at royna at endurgeva tær grundleggjandi treytirnar í tekstilu kvalitetunum hjá ullini **[5]**. Eisini spælir hetta ímóti tí einlittu tropuni og serliga ímóti hugasambondunum, sum eru knýtt at minimalismuni, tí hóast serialitetin eru ein- og tvílittu vovnu verkini sera fjølbroytt. Meðan hestahárini í *Sirm* eru deild ójavnt á teppinum, og tættasta samlingin gongur saman í høgra horni, er tilfarið laðað javnt og samt í *Tað er tvætt í hvørjari ætt*. Líka mikið hvussu nógv hesi verkini tosa til tankan um tað einlitta, órógvar tað krókuta, óregluliga tilfarið øll uppáhald um formellan reinleika.

Susan L. Stoops (1996) hevur lýst, hvussu feministisk listafólk hava ment líknandi heterogen arbeiðsløg til tað



**[4]** BLESS Beauty Hairbrush, 1999, 2024. © BLESS.



abstrakta, sum hugsavna seg um tilfarið, sum avvísa tær maskulinu aðalreglurnar í minimalismuni, sum reypaði sær av at burturbeina øll spor av subjektiviteti úr listaligu upplivingini. Millum 1970'ini og 1990'ini hevdaðu listakvinnur so sum Eva Hesse, Dorothea Rockburne og Lenore Tawney tann konseptuella opinleikan í tí abstrakta sum ein hátt at flyta tað, sum er øðrvísi, fram. Hugsa eitt nú um vevrøðina *Riscos* og *Tierra y fibra* eftir Olga de Amaral, sum hon framleiddi í 1980'ini **[6]**. Loddrættu strimlarnir í hesum listvevnaðinum vóru framleiddir við at veva ull og hestahár saman og mana grindina fram fyri síðan at rista seg leysar. Hetta samlíkir fysisiku og kromatisku massuna í vevingini við sjálva fysiska óreglusemið hjá landmassu. Tað vísir seg, at hesir strimlarnir og bondini mana fram eitt týðiligt vevvitanarkervi, sum er nógv eldri enn grindin: kervið

**[5]** Tita Vinther: *Pætursnótin*, 1998. Listasavn Føroya.
Mynd: Ole Wich.

til at minnast talinformatión í knýttum eindum, sum inkafólk kallaðu *quipu* (Hamilton 2018, 42).

At fara í holt við ta einlitta formatið fyri síðan at slíta tað frá bæði málningadiskursinum og minimalismuni er at endurtaka hesa tropuna við einari røð av opnari spurningum, har kvinnusubjektivitetur, mentanarsøgan hjá ullini og aðrir "smálutir" eru í miðdeplinum og ikki rangstødd. Tað vovna einlitta, sum er litað við ráum, organiskum tilfari og tí natúrliga óstøðugleikanum, sum tað framleiðir, mennir seg móti einum øðrvísi kapasiteti, sum kyknar upp í tí einlitta diskursinum, men sum enn

ofta er skotraður burtur. Feministiska listakvinnan Mary Kelly (1981, 44) heldur, at liturin í sjálvum sær megnar at smoyggja sær undan semiotiskum fangaskapi í tann mun, hann "ongantíð gongur signifikeringini á møti," og introduserar okkurt "øðrvísi á signifikeringsøkinum", sum setir spurning við ta modernistisku, maskulinu virðismetingina av listaligum upphavi. Men at tilluta kromatiska forminum okkurt "øðrvísi" hevur sjáldan verið eitt neutralt bragd í listasøguni, og her nærkast mátin, sum Vinther arbeiðir við teirri einlittu tropuni, einum nógv minni frígerandi dynamikki.

### Tað at vera svørt/svartur og yvirflata

Aftrat tí at seyma einkult hárstrá inn í yvirflatuna á tekstilinum, vav Vinther í summum førum størri stykkir av hestahala í flættur, áðrenn hon hefti tað í ullina. Tað sæst aftur í *Tað er tvætt í hvørjari ætt,* tí yvirflatan á tí tykist týðiliga tjykkri, enn á øðrum verkum í somu røð. Skarðhamar (2011, 96) staðfestir, at Vinther fór at flætta hestahár til summi tekstilir, aftan á hon eygleiddi eina svarta kvinnu, ið fekk sítt hár flættað hjá einum frisøri. Hon gav hennara fyrsta verk við flættaðum hestahári heitið *Maria* (2003) eftir tulkingini hjá Mahaliu Jackson av "Ave Maria."

Hetta dømið um rasuknýtta eygleiðing javnsetur praksisina hjá Vinther við anti-Blackness í søguni hjá tí einlittu tropuni. Tá Kazimir Malevich skrivar eina rasistiska joke inn í rammuna á hansara *Black Square* (1915) **[7]**, hevur Hannah Black (2016, 6) lýst, at hann kallar Blackness inn í tænastuna hjá modernismuni umvegis eitt slag av symbolskum undirkastilsi, sum tvíheldur um ósjónligheitina hjá svørtum: "Málningurin maskerar seg sum ein noktandi representatión, men viðvíkjandi jokini um myrkur – sjálv noktanin verður eitt slag av representatión; tað, sum verður representerað, er tómin í einum ávísum subjekti, sum sipar til ein ávísan tóma í sjálva subjektivitetinum." Hóast tað, sum leiddi til *Tað er tvætt í hvørjari ætt*, ikki er javnlíkt tí týðiliga rasistiska upprunanum í *Black square*, so var tað tann rasuknýtti dynamikkurin í hennara eygleiðing, sum gav henni upplýsingar til verkið. Verkið er bygt við einum líknandi representatiónsstrukturi, ið ikki gongur báðar vegir. Tað vovna endurspælir næstan eygleiðingarløtuna, sipar til aftara partin á høvdinum á tí, ið verður eygleidd, ið ikki kann bera eygnabráið aftur til tann, ið hyggur.

Aktin hjá Vinther at eygleiða endurspeglar eitt nógv størri mynstur, har rasumunir verða fataðir sum og umvegis yvirflatu. Jasmine Nichole Cobb (2023, 132) lýsir "at verða sansað við eygunum", upplivingina at verða lisin á yvirflatuni, sum er í miðdeplinum í kenslubornu upplivingini av anti-Blackness. Tó so kann avmyndaða yvirflatan eisini vera eitt royndarøki hjá myrkum listafólkum, sum "hugsavn[ar] okkara uppmerksemi um tað at vera svørt/svartur sum ein kunstig yvirflata," annaðhvørt við at bjóða rasistiskum representatiónum av ella við at varpa ljós á mátan, sum svørt subjekt sýna ávirkan umvegis self-fashioning. Til dømis kompositiónin



**[6]** Olga de Amaral: *Tierra y fibra 5,* 1988.
Ull og hestahár, 160 x 160 cm.
© Olga de Amaral. Photo: © Diego Amaral. Mynd: Lisson Gallery.



**[7]** Kazimir Malevich: *Black Square,* 1915. Olja á lín, 79.5 x 79.5 cm. Mynd: Wikimedia Commons.

við fýra fotomyndprentum eftir Lorna Simpson *1978-88* (1990), sum vísir næstan eins flættur, grundar um aktina at flætta hár upp á ein annan máta samanborið við yvirflatueygleiðingina í *Tað er tvætt í hvørjari ætt*. Oman á flættunum eru árstølini 1978, 1982, 1988 og orðini "cut, tangle, tie, tug, knot, part, tear, twist, split, weave", ið øll eru bæði navnorð og sagnorð í einum, flyta fram stillstøðu ella rørslu og eitt spektrum við hugasambondum, ið umfevna alt frá harðskapi til umsorgan. Huey Copeland (2013, 92) argumenterar, at drúgva kanningin hjá Simpson um svarta hármentan í slíkum verkum setir "ein møguligan form fyri samband tvørtur um tíð og stað" í forgrundina, sum er tekn um "tær óbroytiligu sannroyndirnar í myrkari kvinnukúgan, men [eisini] eitt ynski at koma í samband við hvørja aðra" tvørtur um ættarlið.

Heitið *Tað er tvætt í hvørjari ætt* undirstrikar munin á støðuni hjá Vinther samanborið við ta, sum Simpsons viðger. Tað er torført at sameina heitið við løtuna, sum fekk Vinther undir at flætta hár. Hon kann hava roynt at reflekterað um hennara egnu royndir við ikki at passa inn í eina familju. Vinther varð fødd, beint tá seinni heimsbardagi breyt út. Tá hon var bara eitt ára gomul, sendu finsku foreldur hennara hana til fosturs í Vejle í Danmark, har danskt bleiv hennara móðurmál. Helst skapti hetta trupulleikar, tá hon varð send aftur til heimlandið í 1947 (Skarðhamar 2011, 87). Hóast tað víkja royndirnar hjá Vinther sum einsaklingi greitt frá teimum kollektivu sambondunum, sum Copeland lýsir, sjálvt um relationell hugskot í roynd og veru upplýstu áskoðanina hjá Vinther um feminismu og vevsøguna.

***

Hetta var bara sumt av tí, sum praksisin hjá Vinther bjóðar høvi at kjakast um. Eg vóni, at hesar reflektiónirnar gera greitt, at snævurskygdu listasøguparametrini, sum eg innleiddi við, eru langt frá nóg góð. Verkini hjá Vinther eggja okkum at hyggja at øðrvísi leiðum.

*Føroyskað hevur Beinir Bergsson*

**VIÐMERKINGAR**

1. Verkini hjá Vinther hava onnur heitir á donskum og enskum: "Familens sorte får" og "The black sheep of the family." Danska og enska heitið rýmar ikki upp á sama máta sum tað føroyska.
2. Eftirsum eg ikki dugi føroyskt og havi avmarkaða atgongd til danskar, enskar og fjølmæltar keldur, verður tónin í hesari ritroyndini meira spekulativ og fer tí at hugsavna seg um størri spurningar, sum hennara verk og aðrir rithøvundar hava sett í samband við føroyska list í donskum samanhangum. Ein gjøllari meting av verkunum eftir Vinther við støði í einum føroyskum, kritiskum diskursi hevði helst sett aðrar spurningar, enn eg ætli mær.
3. Olsen viðmerkti hetta í viðgerðini av samtíðartekstillistakvinnunum Ragnhild Hjalmarsdóttur og Aldu Mohr Eyðunardóttur.
4. Á enskum: *Post Fordist*

**BÓKMENTALISTI**


Berger, Otti. 1930. "Stoffe im Raum." *ReD (Prague)* 3, no. 5: 146.

Black, Hannah. 2016. "Fractal Freedoms." *Afterall* 41: 5-12.

Cassidy, Victor M. 1998. "Chicago Report." *Artnet*. http://www.artnet.com/magazine_pre2000/reviews/cassidy/cassidy1-16-98.asp (seinast vitjað 4. mars 2024).

Cobb, Jasmine Nichole. 2023. *New Growth: The Art and Texture of Black Hair*. Durham: Duke University Press.

Copeland, Huey. 2013. *Bound to Appear: Art, Slavery, and the Site of Blackness in Multicultural America*. Chicago: University of Chicago Press.

Eriksen, Solveig Helles, Cecilie Armand og Iben Katrine Alminde. 2019. "Det er fårene, der driver os sammen." *Information*, 13 December. https://www.information.dk/kultur/2019/12/faarene-driver-sammen (seinast vitjað 4. mars 2024).

Frederiksen, Jens. 2004. "Paintings and Basalt." Í *Kolonialen: 21 North Atlantic Artists*, exh. cat, 74-79. Keypmannahavn: Nordatlantens Brygge.

Grand, Karina Lykke og Anna Maria Dam Ziska (ritstjórnaðu). 2023. *Landslagið í broyting / Changing Landscapes*. Tórshavn: Listasavn Føroya.

Hamilton, Andrew. 2018. *Scale and the Incas*. Princeton: Princeton University Press.

Kelly, Mary. 1981. "Re-Viewing Modernist Criticism." *Screen* 22, no. 3: 41-62.

Krauss, Rosalind. 2008. "Giovanni Anselmo: Matter and Monochrome." *October* 124 (Spring): 125-136.

Nauerby, Tom. 1996. *No Nation is an Island: Language, Culture, and National Identity in the Faroe Islands*. Aarhus: Aarhus University Press.

Olsen, Solveig Hanusardóttir. 2023. "Awareness and Processing." Í Mai Misfeldt (ritstjórnaðu): *Stof til eftertanke / Conscious Threads*, 6-9. Keypmannahavn: Nordatlantens Brygge.

Simonsen, Kim. 2022. "Danske mediers syn på Færøerne er helt ude af takt med tiden." *Politiken*, 12 December. https://politiken.dk/debat/kroniken/art9096158/Danske-mediers-syn-p%C3%A5-F%C3%A6r%C3%B8erne-er-helt-ude-af-takt-med-tiden (seinast vitjað 4. mars 2024).

Skarðhamar, Anne-Kari. 2011. *Tita Vinther*. Tórshavn: Listasavn Føroya.

Stoops, Susan L (ritstjórnaðu). 1996. *More Than Minimal: Feminism and Abstraction in the '70s*. Waltham, MA: Brandeis University.

Warming, Dagmar. 2006. *Faroese Art: A Synthesis of Many Parts*, Tórshavn: Norðurlandahúsið í Føroyum.

Øye, Ingvild. 2008. "Kontakten mellom Bergen og Færøyene i middelalderen i arkeologisk og historisk lys." Í Helgi Michelsen og Caroline Paulsen (ritstjórnaðu): *Símunarbók—Heiðursrit til Símun V. Arge*, 223-232. Tórshavn: Faroe University Press.